# 40 sjúklingar um vikuna

**Nýggja Landssjúkrahúsið er vorðið munandi effektivari. Sjúklingarnir verða innlagdir í styttri tíð, eins og bíðilistin minkar alsamt. – Kanningar vísa eisini, at sjúklingar koma skjótari fyri seg, tess fyrri teir koma út úr sjúkrahúsumhvørvin um, sigur Jóan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni**



*Virksemið á Landssjúkrahúsinum er munandi meiri effektiviserað síðani flutt varð inn í nýggja bygningin. Eitt gott dømi um hetta er talið av skurðviðgerðum, sum er hækkað munandi*

SJÚKRAVIÐGERÐ

*Snorri Brend*

**Havn:** Ein stórur fyrimunur fyri tann einstaka sjúklingin.

Tað kann av sonnum sigast um virksemið í nýggja sjúkrahúsbygninginum, sum var tikin í nýtslu í fjør. Meðan sjúklingar áður kundu liggja inni á sjúkrahúsinum í longri tíð, verður í dag størri orka løgd í, at sjúklingarnir koma út aftur sama dag.

Fyrimunir teirra eru, at teir nú fáa styttri sjúkralegu, og í øðrum lagi eisini styttri bíðitíð eftir sjálva skurðviðgerðina.

Meðan ein ta fyrstu tíðina kundi taka í miðal 26 dagskurðsjúklingar inn hvørja viku, fara í fram-tíðini at koma 40 sjúklingar.

– Áðrenn hesa umskipingina vórðu hesir sjúklingar innlagdir í meiri enn eitt samdøgur ella meiri. Nú er hetta broytt til skurðviðgerðir sum dagsverk.

– Hetta ger longu mun, og vit fara uttan iva eisini at síggja hetta aftur á bíðilistanum, sigur Margretha Petersen, deildarleiðari á G1 í ársfrágreiðingini um virksemið á Landssjúkrahúsinum í fjør.

### Umlegging við góðum úrsliti

Tá nýggi sjúkrahúsbygningurin varð tikin í nýtslu í fjør, var tað ikki bert ein flyting, sum fór fram, men eisini ein nýhugsan av virkseminum. Endamálið var at veita eina betri tænastu, og at hava effektivitet fyri eyga.

Ein avleiðing var, at stórir partar av skurðviðgerðunum vórðu lagdar um til dagviðgerðir, soleiðis at sjúklingarnir møta á sjúkrahúsinum, og verða viðgjørdir og fara heim aftur ein og sama dag.

Sigast kann tí, at umleggingin hevur givið Landssjúkrahúsinum eina effektivari nýtslu.

Vantandi seingjarpláss til sjúklingar, sum skulu undir skurð, hevur verið ein vanligur fløskuhálsur á sjúkrahúsinum.

Men við at leggja skurðviðgerðirnar til rættis sum dagviðgerðir verða nú upp til 40 sjúklingar skurðviðgjørdir um vikuna, uttan at upptaka seingjarpláss í kvøld- og náttartímunum.

### Koma skjótari fyri seg

Tað kann í fyrstu syftu tykjast sum ein verri tænasta fyri sjúklingarnar, at hesir verða sendir heim – at kalla so skjótt, teir eru komnir á beinini aftur.

Men sambært leiðandi yvirlæknanum á kirurgiska deplinum er tað ikki so.

– Kanningar staðfesta, at sjúklingar koma skjótari fyri seg eftir eina skurðviðgerð, um teir koma skjótt burtur úr sjúkrahúsumhvørvinum, sigur Jóan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni í ársfrágreiðingini.

Hetta er somuleiðis ein veruleiki, sum Margretha Petersen kennir aftur frá sínum dagliga arbeiði. Hon er tí ikki í iva um, at nýggja skipanin er ein fyrimunur.

– Tað hevur kravt nógva tilvenjing, bæði fyri starvsfólk og fyri eldru sjúklingarnar, sum eru vanir við at verða liggjandi á sjúkrahúsinum eftir lokna viðgerð.

– Hóast tað kundi vera eitt sindur tungt í byrjanini, hevur tað gingið væl, sigur Margretha Petersen, sum eisini upplivir ein beinleiðis eftirspurning eftir dagskurðviðgerðum millum teir yngru sjúklingarnar.

Yngru sjúklingarnir hava verið fegnir um umleggingina til dagskurðviðgerðir, tí teir vilja helst sleppa undan innlegging. Teir hava hvørki hug ella tíð at liggja á sjúkrahúsinum.

## Skrivligt føroyskt til miðdeild

BÓKAÚTGÁVA

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út Eg skrivi 4 eftir Gunnvá Dam, lærara, sum er skrivligt føroyskt til miðdeild fólkaskúlans. Edward Fuglø hevur hegnisliga myndprýtt bókina. Hetta er fjórða bókin í eini røð av mállærubókum við skrivligum uppgávum til miðdeild fólkaskúlans. Mállæruheftini kunnu nýtast úr 4. flokki upp í 7. flokk, so sum lærarin heldur vera hóskandi.

Í hesari bókarøðini eru mállæruuppgávur, fyrisagnir, uppgávur til fyrisagnir, aftursagnir og ymsar stuttligar uppgávur. Fyrisagnirnar eru eisini gjørdar sum innskrivingarfyrisagnir á tvinnanda torleikastigum og eru í einum serstøkum hefti lagdar hjá útgávuni.

Vegleiðing er í hvørjari bókini sær. Í vegleiðingini verður greitt frá, hvussu høvundurin hugsar sær, at arbeiðast kann við teimum ymsu síðunum. Endamálið við EG SKRIVI-heftunum er at stuðla og eggja næmingunum til at kunna seg væl og virðiliga um tað føroyska málið, so tað fellur teimum lætt og raðið at orðbera seg á góðum og tíðarbærum máli, b©°ði í talu og í skrift.

Føroyaprent hevur prentað. Eg skrivi 4 er 64 síður og kostar 98,00 kr.

## Stutt mállæra

BÓKAÚTGÁVA

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bókina Stutt mállæra eftir Onnu Mariu Reinert Jensen og Harry Davidsen, lærarar. Fyrra uppgávuheftið til bókina er eisini komið í bókasølurnar.

Mállæran er fyrst og fremst ætlað at stuðla næmingunum í føroyskari rættskriving, serliga í 8. og 9. flokki. Høvundarnir hava lagt seg eftir at hava alt tað við, sum lesiætlanin krevur av 9. flokki, og sum hevur týdning fyri rættskrivingina. Høvuðspartarnir í bókini eru ljóðlæra, bendingarlæra, orðalagslæra og teknseting. Stutt mállæra kann sjálvandi eisini vera hent hjá øllum teimum, sum vilja læra seg at skriva rætt.

Til bókina verða gjørd tvey uppgávuhefti, annað til 8. flokk og hitt til 9. flokk. Heftið til 8. flokk er komið út nú, og tað til 9. flokk kemur seinni í skúlaárinum. Í uppgávuheftinum eru 39 málllæruuppgávur. Til tær einstøku uppgávurnar er greinatal, sum vísir til ta greinina í Stuttari mállæru, sum viðger sama evni. Í uppgávuheftinum eru eisini ymsar orðagátur, ið eru at rokna sum eykatilfar til ítrivs. Harafturat verða uppgávur til mállæruna eisini lagdar út á heimasíðu grunsins, www.fsg.fo.

Grafikstudio hevur gjørt sats, uppseting og permu til mállæruna. Bókin er í litum, og rættiliga nógv er gjørt burturúr at fáa eina greiða uppseting. Uppgávubókin er ikki í litum, og hana hevur Føroyaprent umbrotið. Føroyaprent hevur prentað báðar bøkurnar.

Mállæran er 56 síður til støddar og kostar 84,00 kr. Uppgávubókin er 56 síður og kostar 64,00 kr.

## Nýggj roknibók

BÓKAÚTGÁVA

Føroya Skúlabókagrunnur gevur nýggja roknibók út til 1. flokk við heitinum Skygni 1A. Mortan Dalsgarð og Edvard Olsen, lærarar, hava týtt úr donskum og lagað til føroysk viðurskifti. Allan Dalsgarð, Leif Jeppesen og Ingi Joensen hava myndprýtt bókina við litføgrum og frágreiðandi myndum, ið vekja hug barnanna at læra.

Stórar broytingar eru gjørdar í mun til fyrru roknibókina til 1. flokk. Uppgávurnar eru umskipaðar, nýggjar tekningar eru í litum, og haraftrat er eitt støddfrøðiævintýr um fryntarnar í Fryntavík. Ævintýrið stimbrar innlæringina og talfatanina hjá børnunum. Nýggja roknibókin er fyrsta bókin í eini nýggjari dagførdari røð av roknibókum til fólkaskúlan, har føroyski gerandisdagurin er grundstøðið, tá børnini skulu læra talfatan, talfimi og støddfrøðilig hugtøk. Nýggja tilfarið leggur eisini upp til samskifti og spurdómar um støddfrøðilig evni. Børnini skulu eggjast til at undrast og til sjálv at koma við hugskotum til loysnir, sum tey síðani kunnu royna og at enda greiða flokkinum frá.

Skygni 1 A er 80 síður og kostar 72,00 kr. Umframt næmingabókina eru tvey ringbind til læraran, Læraramappa og Avritsmappa. Læraramappan er 98 síður og kostar 700,00 kr. Avritsmappan er 43 síður og kostar 400,00 kr. Føroyaprent hevur umbrotið og prentað.

Í næmingabókini er ein myndatalva av Fryntavík, ið børnini kunnu heingja upp heima við hús. Skúlin fær eina størri myndatalvu at heingja upp í skúlastovuni. Soleiðis kunnu børnini altíð hava hendan ævintýrheim fyri eyga.

## Heiðurskonsert fyri Oughton

**Í kvøld, fríggjakvøldið, verður heiðurskonsert fyri bretska tónleikaran Robert Oughton**



KONSERT

Í dag, 11. august, hevði bretin Robert Oughton verið 85 ár.

Robert Oughton, ella Bob, sum hann var nevndur, var borin í heim í Onglandi í 1920.

Oughton-ættin er av kendastu horntónleikarafamiljunum í Onglandi. Bob var miðlingurin av trimum brøðrum, sum allir spældu í frægastu hornorkestrunum í Onglandi, eins og pápi og abbi teirra gjørdu.

Bob var ein av hollastu stuðlunum til føroyskan horntónleik í seinnu helvt av farnu øld. Robert Oughton var á fyrsta sinni í Føroyum í 1961 og vitjaði aftur fleiri ferðir til hann doyði í 1995.

Umframt, at hann stjórnaði Havnar Hornorkestri hesa tíðina, stovnaði hann unglingaorkestrið í Havn. Hann útsetti eina ørgrynnu av føroyskum tónleiki til hornorkestur, og tað var eisini hann, sum byrjaði aftur við útikonsertum hjá Havnar Hornorkestri.

Eitt tíðarskeið stjórnaði hann eisini orkestrunum í Vestmanna og Fuglafirði.

Í hesum sambandi verður heiðurkonsert fyri Robert Oughton hildin í Listaskálanum fríggjakvøldið 12. august klokkan 19.

Á konsertini verða 10 messingblásarar sum spæla ymiskan horntónleik og endurminningar verða lisnar um Robert Oughton.

Konsertin, sum varðar umleið ein tíma, er ókeypis.